# Svimjing um Nólsoyarfjørð 17. august

**Vikuskiftið eftir Ovastevnuna leggja svimjarar til brots teir 4 km tvørtur um Nólsoyarfjørð**

**Jákup av Skarði**
*Kapping og roysni*



Í ár er fimta árið á rað, at skipað verður fyri kappsvimjing um Nólsoyarfjørð. Tiltakið fellir ikki saman við Ovastevnuna 2002, tí ov harður streymur er tá.

Kappinging um vinnaraplássið er hørð - men sjálvsagt ber eisini til at luttaka fyri at royna roysni.

Í fjør vóru átta luttakarar, og fimm teirra svumu allan teinin. Dia Jacobsen setti nýtt met, tá ið hann svam undan átta øðrum svimjarum og við tíðini 1:20:27 steig á land í Nólsoy.

Hinir svimjararnir, vóru: Bogi Lenvig (1:35:16), Erlendur Simonsen (1:47:17), Kári Simonsen (1:50:10), Gunnar Waagstein (1:58:06), Rannvá Jacobsen (2:13:24), Tommy Andreasen, Katrin Sørensen og Gunnar Dahl Olsen.

Teir svimjarar, ið møguliga ikki vinna beint á portrið ella keiøkið, mugu gera sítt ítarsta, at renna seinasta teinin, tí tíðin verður tald, til luttakarin er í heiðursportrinum.

**Fastur táttur**

Sigast kann, at svimjingin um Nólsoyarfjørð nú er vorðin føst kapping í sambandi við Ovastevnuna - tó, at kappingin í ár er vikuskiftið eftir. Hetta er ógvuliga náturligt, tá ið hugsað verður um, at stevnan verður fyriskipað at fáa til vega svimjihylin, ið Ove Joensen lovaði nólsoyingum.

Nakað er eftir á mál at byggja svimjihylin lidnan, men stuðlanevndin, ið skipað hevur fyri Ovastevnuni hesi árini, hevur gott mót. Fyri hvørt ár eru fleiri stevnugestir, og tiltøkini verða eisini fleiri, at gestirnir skulu hugna sær sum best.

**Leygardagin 17. august, kl. 12 verður skotið av!**

Hevur tú áhuga at luttaka í svimjingini um Nólsoyarfjørð, so er at venda sær til Erlend Simonsen (tlf. 310644) ella Jákup av Skarði (tlf. 327171/217001).

Tú skalt fáa tær til vega: Froskmanna- ella triatlonbúna, bát (min. 6-mannafar) v/ vhf-sendiútgerð og harafturat skulu tvey vaksin verða í bátinum, sigur Jákup av Skarði, sum er ein av fyrireikaranum av Ovastevnuni í Nólsoy.

# Summartiltak fyri eldri úti í Grøv

**Í vikuni verður skipað fyri enn einum summartiltaki úti í Grøv í Klaksvík. Hetta er triðju ferð, at ein slík hugnaløta verður fyri eldri í Norðoyggjum.**

SUMMAR
*Rúna Sivertsen*

Um viðrar verður í morgin skipað fyri hugnaløtu úti í Grøv, sum er ætlað øllum norðingum.

Tað eru, Felagið Hugni, Dagtilhaldið og Áhugabólkurin fyri eldri í Norðoyggjum, ið skipa fyri hesum summartiltaki, sum serliga er ætlað teimum eldru.

Hini bæði árini var undirtøkan góð, fyrru ferð vóru 160 fólk og seinnu ferð 200.

Á skránni verður felagssangur við harmonikuspæli. Jógvan Gerðalíð fer at hugleiða um náttúruna, og minnast aftur á barna- og ungdómsdagar. Eisini verður kaffi og vaflur at fáa.

Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltakið, sum verður lýst nærri í Útvarpinum.



*Aftur í ár verður skipað fyri summartiltaki fyri eldri úti í Grøv í Klaksvík. Hetta er triðju ferð, at ein slík hugnaløta er fyri eldri í Norðoyggjum. Hini bæði árini var undirtøkan góð, fyrru ferð vóru 160 fólk og seinnu ferð 200.*

*Mynd: Norðlýsið*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Martin Andreasen**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og ein serlig tøkk til Frelsunarherin fyri tykkara stóra hjálpsemi.

Tøkk øll tit, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Dagmar og børnini**

# Tvey norsk feløg tikin fyri dumping í USA

**Fjord Seafood eigur tvey av feløgunum, sum USA meinar hava selt laks fyri undirprís á marknaðinum í USA.**

*Jógvan Hugo Gardar, Oslo*

Ein størri amerikansk kanning av 17 laksaútflytarum úr Kili er nú um at vera liðug. Myndugleikarnir kundu ikki finna tey neyðugu prógvini móti 13 feløgum, sum teir kannaðu.

Cultivadora de Salmones Linao Ltda og Salmones Tecmar SA, sum norska Fjord Seafood eigur vóru saman við Los Fiordos og Pesca Chile SA, skuldsett fyri at hava dumpað laks á amerikanska marknaðinum. Amerikanarar nevna tað dumping, tá teir meta seg at kunna prógva, at laksur veður seldur fyri 0,5 prosent undir tí, sum verður sett sum minstiprísur.

Feløgini kunnu nú rokna við bót. Hvussu stórar bøturnar vera verður sett út frá, hvussu stórar mongdir eru seldar fyri dumpingprís. Um eitt felag hevur selt laks fyri eina millión krónur fyri ein undirprís upp á 1,32 prosent undir tí, tað kostar at framleiða laksin, so verður bótin 13.200 krónur.

Í samrøðu við Intrafish.com viðgongur sakførarin Michael Coursey hjá LR Enterprises, at bøturnar eru ikki tær heilt stóru. Men hvørt oyra telur, sigur hann. LR Enterprises var felagið, sum fyrst kom við dumpingákærum móti kilversku laksaútflytarunum.

Frágreiðingin hjá amerikansku myndugleikunum vísir eisini, at fýra feløg sleppa undan at vera granskað aftur. Cultivos Marinos Chiloe Ltda., Pesquera Eicosal Ltda., Salmones Mainstream og Salmones Pacifico Sur SA hava øll verið ákærd fyri dumping tríggjar ferðir. Amerikanskir myndugleikar hava ongantíð funnið nakað prógv fyri, at nakað av hesum feløgunum hevur selt fyri dumpingprís.

Hetta hevur við sær, at feløgini ongantíð aftur vera kannað í USA fyri dumping.






# Hóvliga til verka



*Rúni Hentze er nýggjur tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin og Sandoynna*

**Nýggi sandoyartingmaðurin Rúni Hentze ætlar sær at nýta alla sína tíð til tingarbeiðið, ið næstu tíðina fer at merkja nógv at seta seg inn í. Hóast hann kanska ikki hevur so nógvar royndir, ætlar hann ikki at halda seg aftur**

SAMRØÐA
*Orð: Heri á Rógvi*
*Myndir: Finnur Justinussen*

**Skopun:** Við 92 atkvøðum gjørdist skopuningurin Rúni Hentze nummar tvey á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Sandoynni til seinasta løgtingsval. Nú Páll á Reynatúgvu er vorðin landsstýrismaður, so er ein stólur í nýggja tingsalum settur av til Rúna Hentze at nýta.

Nýggi sandoyartingmaðurin hevur ongantíð sitið á tingi áður, men hann hevur gjørt nakrar royndir, tí fyrstu ferð, hann stillaði upp, var í 1988, men tað hevur ikki bragdað fyrr enn nú.

Hann goymir seg heldur ikki burtur í bygdamyndini. Forbókstavarnir RH standa á portrinum, so tað kann valla vera nakar ivi.

Allíkavæl mugu vit ringja fyri heilt greitt at frætta, hvar hesin nýggi tingmaðurin heldur til, nú vit hava gjørt av at vitja í oynni.

**Altíð Tjóðveldið**

Sum nevnt er navnið á nýggja tingmanninum Rúni Hentze. Hann er 51 ára gamal, er giftur og eigur trý børn og fýra abbabørn. Av uppruna er hann argjamaður, men flutti í 1983 til Skopunar, haðani konan er. Starvið hjá honum er skipari, og hann førir til dagligt 50 tonsaran Ingibjørg.

Alt tað, hann minnist, hevur hann eisini verið tjóðveldismaður. Hann er fullveldismaður av besta slag.

Í valstríðnum legði hann eisini størstan dentin á tann meira tjóðskaparliga partin. – Politikkur má førast eftir alt eftir, um vit vilja hava eitt sjálvstøðugt land ella ikki, sigur Rúni Hentze.

Tríggjar mánaðir eftir valið, á ólavsøku, fekk Rúni sín elddóp, tá hann í aftastu røð gekk skrúgongu saman við hinum tingmonnunum.

Nú, hann er komin á ting, ætlar hann leggja skipara gerningin á hillina eina tíð, og ístaðin nýta alla sína tíð til tingarbeiðið.

– Eg havi fylgt eitt sindur við í arbeiðinum hjá tinginum, men tað er givið, at eg skal seta meg inn í eina øgiliga rúgvu. Eg verið kanska eitt sindur friðarligur at byrja við, men eg ætli mær sanniliga eisini at tosa, tá eg fái møguleikan, sigur Rúni Hentze, ið sostatt verður triði skiparin millum tingmenn Tjóðveldisflokksins. Hinir eru Niklái Petersen og so sjálvandi eisini Tórbjørn Jacobsen.

Og tað verður væntandi eisini á tí tjóðskaparliga økinum, at vit mestur fara at hoyra tað gretta frá Rúna.

– Eg eri fyri einari skipaðari loysing. Verandi leistur er góður, og hesin er í veruleikanum tann sami, sum undanfarna samgonga førdi, sigur Rúni Hentze.

**Verja oynna**

Sum vera man ætlar Rúni eisini at leggja seg eftir at tosa fyri sandoyingar á tingi.

– Her mugu skapast fleiri trivnaðarmøguleikar fyri ungdómin í oynni. Eitt nú við við fleiri fráferðum við Teistanum, soleiðis at ungdómurin ikki blívur burtur frá oynni, sigur Rúni Hentze.

Nýggi tingmaðurin hoyrir eisini til tann bólkin av Sandoyingum, ið fegnir vilja síggja eina ítróttarhøll í bygdini. Ongantíð ov skjótt, sigur Rúni.

Nýggi tingmaðurin ætlar harumframt at lurta eftir fólkinum í oynna, nú hann fer um tinggátt.

